# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: sept. 2017
Mál nr.:
Málsviðgjørt:

**Løgtingsmál nr. XX/2017: Uppskot til løgtingslóg um at byggja barnaheim í Tórshavn**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**at byggja barnaheim í Tórshavn**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at byggja Barnaheim í Tórshavn.
*Stk. 2.* Útreiðslan til verkætlanina kann í mesta lagi vera 60 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Lógaruppskotið er ein liður í einari samlaðari íløguætlan hjá landsstýrismanninum í almannamálum, ið umframt Barnaheimið, eisini fevnir um vardar bústaðir og bústovnar til fólk, ið bera brek.

Hendan verkætlanin hevur til endamáls at útvega betri og størri karmar til børn og ung í Føroyum, sum verða sett heiman og til familjur, sum verða innskrivaði til familjuviðgerð á Barnaheiminum.

Átrokandi tørvur er á einum nýggjum barnaheimi, sum í dag húsast í fimm ymiskum bygningum í Tórshavn. Partar av virkseminum eru á "Gamla Barnaheiminum" meðan annað virksemið heldur til í ymiskum leigumálum kring býin. Talan er fyri ein part um leigumál, sum tíðum verða uppsøgd og í fleiri førum høli, sum eru illa egnaði til endamálið. Samlaða virksemi er skipað undir Eind 10 í Almannaverkinum, men verður her kallað Barnaheimið.

Almannaverkið, sum umsitur Barnaheimið, hevur í nøkur ár víst á, at verandi støða ikki er nøktandi. Hølisviðurskiftini avmarkað møguleikarnar fyri at veita eina nóg góða sosialfakliga viðgerð. Barnaheimið hevur nógva og góða starvsfólkaorku, men orsakað av, at hesi eru spjadd í ymiskum bygningum, er torført at skapa eitt dygdargott fakligt umhvørvið umframt, at tað er trupult at gagnnýta starvsfólkaorkuna á skynsaman hátt. Eisini verður orka í ov stóran mun brúkt uppá at finna hølir, tá leigumál verða uppsøgd ella tá ymiskar einstaklinga fyriskipanir skulu skipast, heldur enn at menna innihaldið í tænastuni.

Barnaverndartænasturnar, sum gera tilmæli um, at børn og ung skulu á stovn, hava eisini víst nakað av ónøgd við innihaldið í viðgerðini á Barnaheiminum og Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið innskrivar børn og ung og familjur til viðgerð á Barnaheiminum, hevur somuleiðis víst á, at tað vanta pláss til familjuviðgerð og til sokallað eftirvernd. Familjuviðgerð og eftirvernd verða nærri útgreinað niðanfyri.

Almannaverkið hevur fakliga mælt til, at virksemið, sum í dag er spjadd, verður samlað á sama staði, og at hóskandi høli verða fingin til vega soleiðis, at innihaldið kann skipast á nøktandi hátt og at rúm verður fyri at hýsa tí virksemi, sum Barnaheimið sambært barnaverndarlógini skal hava.

Landsstýrismaðurin í almannamálum leggur við hesum uppskot fyri Løgtingið um at fáa heimild til at byggja eitt nýtt barnaheim í Tórshavn.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Eingin galdandi lóggáva er um at byggja barnaheim.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at byggja nýtt barnaheim í Tórshavn. Nýggja barnaheimið skal samhýsa verandi virksemi umframt, at nýtt virksemið, sum landið sambært barnaverndarlógini eigur at hava – men ikki hevur í dag, eisini verður staðsett á nýggja barnaheiminum.

Í dag eru 22 børn og ung innskrivaði umframt 2 familjur, sum eru í familjuviðgerð og húsast hesi í 5 ymiskum bygningum saman við út við 50 starvsfólkum.

Tá børn og ung verða innskrivaði á Barnaheimið koma tey í dag á eina móttøkudeild, áðrenn tey verða flutt víðari til teirra"stovnspláss". Endamálið við uppihaldinum í móttøkudeildini er at útgreinað viðgerðartørvin nærri og at finna útav, hvønn barnabólk og stovn barnið fær bestu menningarmøguleikar saman við. Eisini verður fyrsta tíðin á móttøkudeildini brúkt til at læra barnið at fylgja einum vanligum gerandisdegi, at sova um náttina, at eta saman við øðrum og at fylgja eini skúlaundirvísing.

Í dag er tað ein trupulleiki, at móttøkudeildin og hinar deildirnar á Barnaheiminum eru spjaddar kring Tórshavn og tískil verður barnið ella tann ungi fluttur óneyðuga nógv.

Móttøkudeildin verður partur av nýggja barnaheiminum. Á henda hátt verður møguleiki fyri at fáa eina betri útgreining av tørvinum, og barnið sleppur samstundis undan at flyta á annan stovn, men heldur í aðra eind.

Nýggja barnaheimið kemur at hava 4 bú- og viðgerðareindir, sum hýsa 5 børnum hvør. Ætlanin er, at hvør bólkur kemur at húsast í eini eind, sum er meinlík einum vanligum heimi við kømurum, vesi, køki og alrúmi.

Sum nakað nýtt verða eisini ein sokallað eftirverndareind á nýggja barnaheiminum. Talan er um viðgerð til ung í aldrinum 18 - 23 ár, sum geva samtykki til uppihald á barnaheiminum, og sum spakuliga skulu venja seg við at taka ábyrgd av egnari lívsførslu og at búgva í egnum bústaði.

Á nýggja barnaheiminum verða 4-6 smáar sjálvstøðugar íbúðir til endamálið og kunnu íbúðirnar eisini nýtast til 16- 18 ára gomul um umstøðurnar hjá barninum og eindini loyva tí.

Nýggja barnaheimið kemur at hava munandi fleiri pláss til familjuviðgerð.

Endamálið við at innskriva familju til familjuviðgerð er at styrkja foreldraførleikan hjá foreldrunum við ráðgeving og vegleiðing og at veita familjuviðgerð annars í mun til tørvin hjá familjuni.

Í dag eru bara 2 íbúðir á barnaheiminum til familjur. Sambært barnaverndartænastunum og Høvuðsbarnaverndarnevndini er hetta alt ov lítið. Miðast skal eftir,at so fá børn sum gjørligt verða sett heiman orsakað av umsorganarsvíki og tí er alneyðugt at styrkja tann fyribyrgjandi partin. Í hesum sambandi eru fleiri pláss til familjur á barnaheiminum avgerandi, tí tað á henda hátt ber til at lofta familjuni sum eini heild og tryggja, at trupulleikarnir, ið familjan hevur at dragast við, verða loystir saman við familjuni á staðnum.

Samdøgursviðgerð av familjum varðar vanliga 4 mánaðir við møguleika fyri leingjan. Dagviðgerð verður eisini bjóða familjum, sum hava fingið viðgerð á stovninum. Dagviðgerð er skiftivís úti í heiminum og hjá familjunum og familjur koma inn til samrøður og vegleiðing.

Nýggja barnaheimið kemur at hava 8-10 íbúðir og hølir sum kunnu hýsa dagviðgerð til familjur.

Byggingin fevnir sostatt um:

- 1 móttøkudeild við 2 kømurum og 2 skermaðum íbúðum
- 4 bú- og viðgerðareindir við tilsamans 20 kømurum við atgongd til vesi og felagshøli
- 1 eftirverndareind við 4-6 smáum íbúðum
- 1 familjueind við 8-10 íbúðum í ymiskum støddum – herav eisini samveruíbúð

Harumframt fevnir byggingin eisini um felags funktiónir - so sum rørslu- og sansarúm; samrøðuhøli; undirvísingarhøli; fundarhøli; stórkøk, felags vaskarí, skrivstovueind og starvsfólkarúm.

Landsstýrismaðurin hevur valt, at Barnaheimið skal byggjast í Tórshavn

Við at staðseta Barnaheimið í Tórshavn ber til at røkka einum breiðari endamáli. Mett verður, at samhýsingin av verandi virksemi og nýggja virksemið kemur at hava við sær eitt sterkari fakligt umhvørvið tí øll starvsfólkaorkan verður samlað á einum staði heldur enn at halda til í fleiri smáum húsum kring Tórshavn. Harumframt er atgongdin til aðrar almennar tænastur, eitt nú viðgerð frá Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, Sálarfrøðingum, Sernámi og øðrum eindum í Almannaverkinum, sum børnini/tey ungu og í ein ávísan mun familjurnar eisini hava tørv á, lættari tá Barnaheimið liggur í Tórshavn heldur enn aðrastaðni.

Samskifti hevur verið millum Almannamálaráðið og Tórshavnar kommunu um møgulig grundøki at byggja á. Tórshavnar kommuna hevur víst á nøkur grundøki, sum eru egnaði at byggja nýtt barnaheim á. Eftir ætlan verður bygt á miðskeiðis í Tórshavn. Byggingin fevnir um sjálvan bygningin, atkomuna, uttanumøki og parkeringsøki. Bygt verður í tveimum hæddum. Samlað er talan um áleið 2000 m².

Dentur verður lagdur á, at Barnaheimið á skal líkjast so nógv einum vanligum privatum heimi sum gjørligt heldur enn einum stovni. Umráðandi er tískil, at bygningurin fellir væl inn í umhvørvið.

Av tí, at talan verður um  børn og ung, sum eru sera ymisk og hava hvør sín serstakan tørv, verður hædd tikin fyri hesum í byggingini.

Innihaldið í Barnaheiminum er nærri lýst í funktiónsanalysu, sum er løgd við sum fylgiskjal. Funktiónsanalysan er tilevnað av arbeiðsbólki við umboðum fyri Almannamálaráðið, Almannaverkið og Kommunufelagnum.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur við sær, at landsstýrismaðurin fær heimild til at byggja nýtt barnaheim í Tórshavn fyri áleið 60 mió.kr. Gongst sum ætlað, verður Barnaheimið liðugt í 2022.
Nýggja Barnaheimið skal skapa karmar fyri, at børn og ung, sum eru sett heiman og familjur, sum eru innskrivaði til familjuviðgerð, fáa betri og  fjølbroyttari tilboð og viðgerð í einum tryggum og samanhangandi viðgerðarumhvørvið har fakligu førleikarnar hjá starvsfólkum verður gagnnýtt á fullgóðan hátt, samstundis, sum raksturin verður skynsamari.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá fylgjandi pørtum:

- Barnabati
- Sosialráðgevara Føroya
- Kommunufelag Føroya
- Almannaverkið
- Føroya Kærustovni, sum er skrivstova hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**

Byggimál eru vanliga býtt upp í 6 stig. Tey eru byggiskrá, skipanaruppskot, projektuppskot, forprojekt, høvuðsprojekt og projektuppfylging. Harumframt er gjørt eitt arbeiði frammanundan, sum verður nevnt funktiónsanalysa.

Tess fleiri stig arbeitt hevur verið við í byggimálinum, tess nærri verður neyvleikin av samlaðu kostnaðarmetingini.

Hendan verkætlanin er á einum byrjanarstøði og byggir kostnaðarmetingin einans á metingar. Hetta er fyrsta verkætlan av hesum slag í Føroyum og tí ber ikki til at samanbera hesa verkætlan við aðrar verkætlanir.

Kostnaðurin er tí út frá omanfyrinevnda fyrivarni mettur til áleið 60 mió. kr. Innan fyri hendan fíggjarkarm verður mett, at til ber at projektara og byggja eitt nýtt barnaheim.

Útreiðslurnar verða eftir ætlan fíggjaðar yvir fíggjarárið 2017 við 100 tús. kr., 2018 við 7 mió. kr., 2019 við 7 mió. kr., 2020 við 10,2 mió. kr., 2021 við 25,9 og 2022 við 9,8 mió. kr.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**

Lógaruppskotið førir við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**

Lógaruppskotið hevur við sær, at børn og ung, sum eru sett heiman fáa munandi betri bú- og viðgerðarumstøður. Eisini fáa familjur, sum verða innskrivaði til familjuviðgerð munandi fleiri og betri viðgerðarpallar enn higartil. Harumframt fáa eisini starvsfólk betri arbeiðsumstøður at virka undir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá børnum, sum varð settur í gildið fyri Føroyar í 1993.

Sambært grein 18 í barnarættindasáttmálaunum viðurkenna limalondini skyldu at veita foreldrum og verjum nøktandi stuðul, tá tey útinna sínar skyldur sum barnauppalarar og skulu tryggja, at stovnar, skipanir og tænastuveitingar til barnaumsorgan verða ment.

Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesar viðurkendu ásetingarnar.

**2.9. Marknaforðingar**
Ongar marknaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp í 60 mió kr. til bygging av nýggjum barnaheimi.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Greinin heimilar landsstýrismanninum at byggja nýtt barnaheim fyri í mesta lagi 60 mió. kr.

**Til § 2**
Greinin er gildiskomuregla og sólseturáseting. Sostatt fer lógin úr gildi 31. desember 2024. Ásetingin tekur støðu í byggiætlanini og tær royndir, sum gjøgnum árini eru gjørdar, og sum vísa á, at seinkingar, ið ikki víðka fíggjarkarmin, kunnu koma fyri.

Almannamálaráðið, 28. september 2017.

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Funktiónsanalysa